Heilsuverk Føroya



# Kunning um screening fyri CTD-sjúku

## Um CTD-sjúkuna

Sum teimum flestu kunnugt er CTD (carnitin transporter defekt) lutfalsliga meiri vanlig í Føroyum enn í øðrum londum. Roknað verður við, at umleið 1 út av 400 persónum hava sjúkuna. Hinvegin er viðgerðin ómakaleys og ófarlig. Neyðugt er regluliga at taka carnitin ískoyti. Carnitin hevur ongi týðandi hjáárin. Við viðgerð eru lívsævisvónirnar normalar. Fá meiri at vita um CTD-sjúkuna í faldaranum "Kunning um CTD" á www.himr.fo

## Hvat kostar tað at lata seg kanna

Tikið verður eitt gjald á 100 kr. Tó so, at tey, sum hava ávísing frá lækna vegna grundaðan illgruna um CTD-sjúku ella nærskyldskap (trímeningar ella nærri), kunnu fáa kanningina ókeypis, um tey hava ávísing frá lækna.

## Um illgruni er um CTD-sjúku

Um tað í sambandi við kanningarnar verða funnin úrslit, sum geva orsøk til víðari kanningar, verður viðkomandi persónur kontaktaður av vaktlækna á Landssjúkrahúsinum. Persónurin verður settur í fyribyrgjandi viðgerð, meðan kanningar verða gjørdar, herundir heilsu- og hjartakanning.



## Berari av CTD

Berarar verða ikki staðfestir við screeningini.

## Hvussu verður blóðroyndin tikin?

Blóðroyndin verður vanliga tikin úr arminum. Blóðroyndin er vanliga umleið 3 ml. Partur av blóðroyndini verður settur á serligt filturpapír, ið verður sent til kanningarstovu uttanlands í Týsklandi ella Danmørk. Møgulig restnøgd verður goymd í kliniska biobankanum í heilsuverkinum. Hetta er í sambandi við møguligar eftirfylgjandi ella nýggjar kanningar, og har tað er neyðugt, viðkomandi ella praktiskt at hava royndina á goymslu.

Sí nærri í faldaranum “Kunning um handfaring av blóð– og vevnaðarroyndum, ið verða latnar til kanningar í heilsuverkinum”.
Sí eisini faldaran “Kunning til sjúklingin um talgilda heilsuskipan”. Um tygum ynskja, at royndin skal burturbeinast eftir kanning, kunnu tygum siga frá í sambandi við blóðroyndina ella seinni.

**Er neyðugt at fasta?**
Fyri at lata seg kanna fyri CTD er ikki neyðugt, at tú ert fastandi.

**Hvussu við úrslitinum av kanningini?**
Sum vanligt í sambandi við screeningar av PKU-kortum verða úrslit einans send í teimum førum, har tað er orsøk til víðari kanningar. Tó so, at fólk hava rætt til innlit í egnar upplýsingar.

**Hvar kann eg venda mær?**
Spurningar og umbønir um svar kunnu setast Screeningseindini á tel. 30 45 18 ella til t-post: screeningseindin@ls.fo



**Screeningseindin/Rannsóknarstovan**
Landssjúkrahúsið
J. C. Svabosgøta 41-47
FO-100 Tórshavn

Rannsóknarstovurnar á:
Klaksvíkar Sjúkrahúsi tel: 45 45 45 - www.ks.fo ella
Suðuroyar Sjúkrahúsi tel: 34 33 00 - www.ssh.fo

Meiri kunning um CTD er á www.himr.fo

Dagført: dec. 2015

Heilsuverk Føroya